# *Limir í Føroya Fróðskaparfelag farnir seinastu 10 árini:*

**Sverri Dahl**, 31. mars 1910 – 8. mai 1987. Sverri Dahl varð føddur í Tórshavn. Hann varð studentur í Sorø 1928 og las guðfrøði og fornfrøði í Kepmannahavn og Oslo. 1943-52 var hann skrivari hjá Staðanavnanevnd løgtingsins og stílaði fyri stórinnsavning av staðanøvnum um alt landið. Í 1952 gjørdist hann landsantikvarur og var fyristøðumaður fyri Føroya Fornminnissavni, til hann fór frá fyri aldur í 1980.

Hann hevur merkt spor í fornfrøði Føroya við sínum mongu útgrevstrum og rannsóknum í sambandi við teir. Stílaði fyri rannsóknum í Kirkjubø 1953-56 við luttøku úr Danmørk og Noregi. Um fornminnini í Kirkjubø var hann kønastur av øllum, men tíverri fekk hann ikki høvi til at kunngera rannsóknarúrslitini. Serliga kendir og týðandi vóru útgrevstrirnir av víkingaaldarhúsum í Kvívík og víkingaaldargrøv í Tjørnuvík.

Hann tók lut í undirvísingini á Fróðskaparsetrinum fyrstu árini. Frásøgumaður var hann frálíkur. Hann skrivaði forvitnisliga bók um Havnar kirkju. Hann var ein av stovnarum Fróðskaparfelagsins og var í nevnd felagsins í 25 ár. Hann var ein av høvuðsfyrireikarunum til hin viðgitna víkingafundin í Føroyum 1965.

Hann hevur skrivað hesar greinir í Fróðskaparrit:

1952. *Tvey fornminni í Syðrugøtu*. 1. bók: 149-175.
1953. *Rúnasteinur í Fámjin*. 2. bók: 36-44.
1953, saman við Jóannesi Rasmussen. *Nólsoyarfundurin*. 2. bók: 45-59.
1955. *Um tíðarfesting av føroyskum fitisteinsfundum*. 4. bók: 61-84.
1956. saman við Jóannesi Rasmussen. *Víkingaaldargrøv í Tjørnuvík*. 5. bók: 153-167.
1958. *Toftarannsóknir í Fuglafirði*. 7. bók: 164-167.
1961. *Bústaðir í Eingjartoftum, Sandavági*. 10. bók: 53-76.
1965. *Víkingabústaður í Sørvági*. 14. bók: 9-23.
1970. *Um ærgistaðir og ærgitoftir*. 18. bók: 361-368.
1976. *Skráseting av føroyskum miðaldar kirkjugripum*. 24. bók: 82-109.
1978. *Halgigongukrossur úr Kirkjubø*. 25. bók: 57-65.

Sverri var m.a. kosin limur í Kungl. Gustav Adolfs Akademien í Uppsølum í Svøríki. Fróðskaparfelagið ognaði honum 28. og 29. bók av Fróðskaparritum sum heiðursrit á 70 ára føðingardegnum 31. mars 1980.

**John Davidsen**,
2. februar 1906 – 28. oktober 1988.
John Davidsen varð føddur í Havn. Hann tók læraraprógv í Havn 1932. Frá 1934 var hann lærari í Tórshavnar Kommunuskúla, síðan 1968 í Venjingarskúlanum. Hann fór frá við eftirløn í 1972. Hóast likamsbrek frá barndómsárum, ið hefti hann nógv, sýndi hann ómetaligt seiggi og læt seg ikki kúga. Arbeiðssamur var hann sum fáur. Hann stóð fyri útgávu av álmanakkum hjá Gamla Bókhandli til tað síðsta, ritstýrdi Songbók Føroya fólks og fjøld av minnisritum, eitt nú tí ómetaliga henta savninum *Greinir og ritgerðir* eftir dr. Jakob Jakobsen. Hann starvaðist á Landsskjalasavninum í mong ár, eftir at hann fór úr lærarastarvi. Ættfróður var hann framúr, helt í mong ár kvøldskeið í ættargransking á Fróðskaparsetrinum.

John Davidsen var leingi annar grannskoðari felagsins. Hann hevur skrivað hesar greinir í Fróðskaparrit:

1964. *Jákup í søgn og søgu*. 13. bók: 213-224.
1970. *Hústrúin í Húsavík*. 18. bók: 69-76.

**Reidar Djupedal**, 1922 – 29. juli 1989.
Ólavsøkudag 1989 andaðist ein felagsmaður okkara og góður Føroya-vinur, Reidar Djupedal professari í Tróndheimi. Reidar Djupedal varð føddur í Oslo, men hevði ættarrøtur í Selju í Norðfirði. Um søgu, mál og mentir í heimbygd síni hevur hann skrivað nógv.

Hann varð studentur í 1941 og fór at lesa søgu, enskt og norskt á lærda háskúlanum í Oslo. Hann fekk sum so mangur annar frælslyndur norðmaður at kenna týska harðræðið. Í november 1943 varð hann saman við øðrum studentum og lærarum tikin á hondum og fluttur í fangatippi í Týsklandi. Hann var fámæltur um roynslur sínar har, men tær munnu hava merkt hann fyri lívið bæði til likams og sálar. Í 1950 gjørdist hann cand. philol. og fór síðan í starv hjá norsku orðabókini í Oslo. Har starvaðist hann í eitt ár til hann í 1951 varð lektari í norskum á lærda háskúlanum í Keypmannahavn við skyldu eisini at halda fyrilestrar í Århus. Tað var hesa tíðina, at hann av álvara kemur í takføri við føroyskt. Tað var eisini so sjálvandi, at maður sum Reidar fekk hug fyri føroyskum, tí hann var nýnorskmaður um ein háls og hevur sæð so nógv, sum hesi nærskyldu mál hava havt saman í søgu og lagnu. Faðirin at norska skriftmálinum, Ivar Aasen var hansara fremsta rannsóknarevni. Longu fyrsta árið í Keypmannahavn skrivaði hann ta týðandi yvirlitsritgerðina um Jens Chr. Svabo og virki hansara. Hon varð prentað í bd. 32 og 33 av Varðanum, eisini kom hon út sum serstøk bók. Har koma væl til sjóndar serstøku evni hansara at leita fram tilfar í skjalasøvnum.

Her verður ikki høvi at gera nógv burtur úr víðfevndu norsku gransking hansara. Bert skal verða nevnt, at í eitt 6 ára skeið í 1950-árunum, meðan hann hevði styrk fyrst frá Norges almenvitenskapelige fond (NAVF) og síðan frá lærda háskúlanum í Oslo, gav hann út brøv og dagbøkur Ivars Aasen í 3 bindum. Hansara verk er eisini ljósprentaða útgávan av blaðnum Dølen hjá Vinje. Í 1962 varð hann dosentur við lærda háskúlan í Bjørgvin og 1968 professari í

Tróndheimi. Hann legði frá sær í 1968. Annað stórverk hansara fyri føroyskt mál er "Litt om framvoksteren av det færoyske skriftmålet", ið varð prentað í greinasavninum "Skriftspråk i utvikling. Tiårsskrift for Norsk språknemnd, Oslo 1964.

Í Fróðskaparrit hevur hann skrivað greinina:

1964. *Kring J.H. Schrøters omsetjing av Matteus-Evangeliet, 1823*. 13. bók: 235-262.

**Jón Helgason**, 30. juni 1899 – 19. januar 1986.

Jón Helgason, professari í Keypmannahavn varð borin í heim á Rauðagili í Hálsaveit í Borgarfirði. Faðir hansara var bóndi. Hann tók studentsprógv í Reykjavík 1916, las norrøn frøði við lærda háskúlan í Keypmannahavn, varð doktari við Háskóla Íslands 1926 fyri ritgerð um Jón Ólafsson Grunnvíking, skrivara Árna Magnússonar. Eftir tað var hann professari í íslendskum máli og bókmentum við lærda háskúlan í Osló og síðan (1927) bókavørður á Árna Magnussonar savni í Keypmannahavn. Har tók hann við eftir Finn Jónsson í 1929 sum professari í fornislendskum máli og bókmentum. Samtíðis varð hann fyristøðumaður fyri Árnasavni. Hesi størv røkti hann, til hann legði frá sær fyri aldur.

Hann hevur skrivað hópin av bókum og greinum um frøðigrein sína og hevur harumframt verið stórvirkin útgevari av fornum íslendskum handritum. Hann var m.a. ritsjóri á útgávurøðini Bibliotheca Arnamagnæana. Serligan áhuga okkara man hava útgáva hansara av íslendskum fornkvæðum, t.e, kvæðum átøkum okkara dansikvæðum. Hann var gitin fyri at vera vandin útgevari, ið setti strong krøv til sín sjálvs og teirra, ið hann starvaðist saman við.

Á ungum studentsárum kom hann til Føroya at vera lærari á skeiði í íslendskum, sum Føroya kennarafelag, sum lærarafelagið æt tá, skipaði fyri. Hann hevði tilhald á háskúlanum hjá Símuni av Skarði. Hetta man hava givið kveikin til tann alsk, hann alla ævi hevði til føroysk mál, sum hann talaði og skrivaði ikki bert lýtaleyst, men av list og stílsnild. Aftur at sínum stóra verki um íslendskar mentir hevur hann eisini givið sær stundir at skriva um føroysk evni.

Hann hevur skrivað hesar greinar um Føroyar í Fróðskaparrit og í øðrum tíðarritum eisini:

1922. *Flóvants ríma*. Varðin 2: 111-117.
1924. *Færøiske studier, I. Den ældste optegnelse af færøske kvad 2. Ljómur på Færøerne*. Maal og Minne. Oslo: 29-48.
1931. *Tvey gomul føroysk skrift*. Varðin 11: 65-84.
1932, saman við Janusi Øssurssyni. *Íslendsk lesibók*. Keypmannahavn.
1932. *Lucas Debes*. Føroyingafelagshefti 2. Keypmannahavn.
1945. *Ljómurnar*. Útiseti (I). Keypmannahavn: 19-29.
1951. *Kongsbókin úr Føroyum*. Útiseti VI. Keypmannahavn: 101-122.
1952. *Nøkur orð aftrat um kongsbókina*. Útiseti VII. Keypmannahavn: 113-115.
1964. *Jófreys kvæði*. 13. bók: 140-157.
1970. *Þriðji íhaldskarl*. 18. bók: 206-226.

**Karsten Hoydal**,
28. mars 1912 – 4. apríl 1990.
Karsten Hoydal varð borin í heim í Hoydølum, har sum faðirin Dánjal Hoydal var umsjónarmaður á Bróstsjúkrahúsinum.

Ungur fór hann til Danmarkar at nema sær kunnleika í búnaðarfrøði og tók prógv sum cand. agro. í 1936 og lic. agro. í 1940. Hann var eina tíð í starvi á rannsóknarstovuni hjá danska fiskimálaráðnum og vann sær har góðan kunnleika í fiskiídnaðarmálum.

Eftir stríðslok kom hann heim til lands at taka upp starv. Hann stóð í 4 ár fyri niðursjóðingarvirkinum hjá Kjølbro í Klaksvík og tók síðan við fyristøðu fyri teirri nýstovnaðu Fiskiídnarstovuni. Tá ið seturshúsið var bygt á Debesartrøð í 1967, fekk Fiskiídnaðarstovan eins og Fiskirannsóknarstovan innivist har. Karsten starvaðist í niðastu hæddini.

Árini 1954-57 var hann í Eucador í Suður-Amerika í ørindum fyri ST-stovnin FAO. Har stílaði hann fyri at byggja fiskavirki sum lið í at hjálpa fiskivinnuni í landinum á føtur. Royndir og inntøk úr teimum árunum hava sett sær sjónsk spor í skaldskapi hansara.

Sum rithøvundur og skald er Karsten kendari millum manna enn fyri borgarliga yrki sítt. Myndlist hevði hansara stóra áhuga. Sum týðari av skaldskapi skaraði hann framúr. Fleiri søvn við týddum yrkingum liggja eftir hann. Í 1989 varð hann heiðraður fyri skaldskap sín við bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens.

Av yrkisritum er at nevna: 1948-1950 *Fiskivinnublað Føroya*, sum hann var blaðstjóri á, og bøkur um fiskavirking: 1953 *Sild og salting*, 1962 *Viðgerð av fiski*, og 1974 *Móttøka og goyming av feskum fiski*. Hann hevur skrivað hesar greinir í Fróðskaparrit:

1952. *Kannan av fiti í sild*. 1. bók: 105-113.
1958. *Fiti í sild veidd í norðuratlantshavinum og á firðum í Føroyum*. 7. bók: 7-21.
1968. *Eitt dømi um saltfisk, ið var mislittur av koppari ($Cu^{++}$)*. 18. bók: 9-22.

Í samfelagslívi læt hann við seg koma á mangan hátt. Í 1960 beyð hann seg fram til fólkatingsval í mótmæli móti herstøðini, sum var í gerð í Mjørkadali og á Sornfelli. Landsstýrismaður var hann fyri Tjóðveldisflokkin 1963-66 og løgtingsmaður 1966-70.

**Hans Jacob Jacobsen (Heðin Brú)**,
17. august 1901 – 18. mai 1987.
Hans Jacob Jacobsen varð føddur í Skálavík. Ungur var hann til skips, var á Føroya Fólkaháskúla ein vetur og fór síðan til Danmarkar at nema landbúnaðarfrøði, hann varð búfrøðingur frá landbúnaðarháskúlanum í 1928. Heimafturkomin kom hann sama ár at starvast sum hjálparmaður hjá búnaðarráðgevanum. Sjálvur kom hann í hetta starv í 1942 og sat í tí til hann legði frá sær fyri aldur í 1968.

Undir dulnevninum Heðin Brú er hann kendur sum eitt hitt mætasta søguskald okkara, og tann týdningur hann hevur havt fyri føroyska málmenning sum stílfyridømi metist ikki til fulnaðar. Skaldsøgur hansara og stuttsøgur eru av tí besta, ið skrivað er á føroyskum.

Hann var við í Føroya Fróðskaparfelag

frá byrjan og var hann mong ár annar grannskoðari felagsins. Í Fróðskaparrit hevur hann skrivað greinina:

1952. *Eplaálurin, ein nýggj eplasjúka í Føroyum.* 1. bók: 122-141.

**Anthon Kruse**,
12. apríl 1921 – 13. desember 1983.
Anton Kruse varð føddur á Eiði. Útbúgving fekk hann sum búfrøðingur. Eftir hetta var hann eitt skifti í Føroyum, og hevði hann tá ætlanir um at fáast við jarðarbúk her, men hugsanir hansara um, hvussu hetta skuldi skipast, vunnu ikki frama. Hann valdi tískil at fara aftur til Danmarkar. Her fekk hann starv sum lektari við landbúnaðarháskúlan í Keypmannhavn. Í Fróðskaparrit hevur hann skrivað greinina:

1973. *Ein kromosomkanning av sinugrasi (reyð-vingli, Festuca rubra L.), ið vaksið hevur ymsastaðni í Føroyum.* 21. bók: 28-33.

**Agnete Loth**, 1922 – 2. juni 1990.
Agnete Loth varð mag. art í norrønari málfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn í 1947, men longu sum studentur fór hon at starvast á Árnasavni (Den arnamagnæanske Samling – seinni: Institut). Í 1953 kom hon í starv sum lærari í norrønum á lærda háskúlanum, og í mong ár leiddi hon danskar móðurmálsstudentar inn í norrøna málið, til tað ikki longur var kravt í 1970. Í sambandi við undirvísing sína gav hon út ta nógv nýttu *Gísla søgu* í 1956. Tá ið Det Arnamagnæanske Institut varð sett á stovn í 1956 kom hon í fast starv har, og har virkaði hon til deyðadags.

Hon avrikaði nógv við at geva út norrønar tekstir. Hon eigur soleiðis 8 bind í tekstarøðini *Editiones Arnamagnæanæ*. Í ljósprentarøðini *Early Icelandic Manuscripts* gav hon út tvey av bindunum. Eisini ritstýrdi hon tíðindariti stovnsins *Bulletin* frá byrjan. Í 1975 giftist hon Jóni Helgasyni professara. Eftir at hann doyði í 1986 greiddi hon til prentingar rit, ið lógu eftir hann. Seinni árini gjørdi hon nógv við at týða norrøn halgirit til danskt. Í Fróðskaparrit hevur hun skrivað greinina:

1970. *Lucas Debes og Torfæus.* 18. bók: 129-150.

**Christian Matras**,
7. desember 1900 – 16. oktober 1988.
Chr. Matras varð borin í heim á Viðareiði. 12 ára gamal fór hann til Havnar at ganga í skúla. Har tók hann realprógv í 1917. Í 1920 tók hann studentsprógv í Sorø og varð í 1928 magistari í norrønari málfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Í 1933 vardi hann doktararitgerð sína um staðanøvn í Norðuroyggjum. Í 1936 varð hann dosentur og í 1952 professari á sama háskúla. Tí starvi sat hann í, til hann í 1965 kom heim at verða fyristøðumaður fyri nýstovnaða Fróðskaprsetrinum, tí, ið seinni varð Føroymálsdeild setursins. Hann legði frá sær í hesum starvi í 1972. Chr. Matras var heiðursdoktari við Háskóla Íslands og universitetið í Uppsølum. Í 1981 varð hann saman við Føroya Fróðskaparfelag heiðraður við Ossian-heiðurslønini, ið var 20.000 DM. Hetta fæ varð eftir hansara

ynski lagt í grunn, ið skuldi veita sømdarpening einstaklingum, ið høvdu gjørt eitthvørt munagott føroyskum máli til bata.

Fróðskaparfelag dugnaði hann frá tí fyrsta og varð limur frá byrjan. Hann var vísindaligur fyristøðumaður fyri málstovninum, ið varð settur á stovn í 1958. Tað var vegna Fróðskaparfelagið, at hann gav út føroysku-donsku orðabókina í 1961. Í 1964 helt hann royndarskeið á málstovninum, tað sum var byrjanin til árskeiðini í føroyskum á Fróðskaparsetrinum. Tá ið hann fylti 70, hevði felagið ta gleði at kunnu víga honum 18. bók av Fróðskaparritum sum heiðursrit. Skald og vísindamaður var hann av teimum fremstu, ið Føroyar hava fostrað. Hesar greinir hevur Chr. Matras skrivað í Fróðskaparrit:

1952. *Ljóðskifti í føroyskum av sama slag sum "skerpingin" í frumnorrønum*. 1. bók: 177-180.
1953. *Hvat er íslendska orðið naumur?* 2. bók: 20-27.
1953. *Fornnorrønt fn verður til føroyskt dn*. 2. bók: 28-35.
1954. *Làmh chearr í føroyskum máli*. 3. bók: 60-77.
1955. *Soppur í føroyskum og sopp í írskum* 4. bók: 15-31.
1956. *Caigeann og køkja*. 5. bók: 98-107.
1957. *Drunnur*. 6. bók: 20-33.
1958. *Atlantssiðir – Atlantsorð*. 7. bók: 73-101.
1959. *Føroyanavnið eina ferð enn*. 8. bók: 39-56.
1962. *Blak (Serum Butyri)*. 11. bók: 7-14.
1962. *Finna, peð og bekkur*. 11. bók: 26-33.
1964. *Sólund: Súlund*. 13. bók: 130-139.
1973. *Håkon Hamre (minnisorð)*. 21. bók: 190-192.
1981. *Korkadalur*. 28.-29. bók: 78-80.

**Mortan Nolsøe,**

21. juni 1924 – 25. apríl 1987.

Mortan Nolsøe varð borin í heim suðuri í Vági. Hann tók studentsprógv í Havn 1942. Í 1946 fór hann at lesa á lærda háskúlanum í Osló, fyrst norrøna málfrøði, síðan legði hann høvuðsdent á tjóðminnafrøði við týskum og enskum sum stuðulsgreinum. Hann tók cand.mag. prógv í 1960 og magistarastigið (mag.art.) í 1964. Próvritgerðin var um trúgv og siðir í sambandi við útróður í Føroyum, skrivað á føroyskum, og verður hon prentað í næstum í Færoensia.

Í átta ár, 1965-72, starvaðist hann á tjóðminnadeild lærda háskúlans í Osló, sum savnsvørður (konservator). Í 1972 kom hann heim aftur til lands at starvast á Fróðskaparsetrinum sum lærari og granskari. Høvuðsøki hansara var kvæðagransking, sum hann var kendur og virdur fyri víða um lond.

Hann hevur verið stórvirkin savnari av skaldskapi av manna munni, sum hitt stóra ljóðbandasavnið á Føroyamálsdeildini ber vitni um. Sera virðismikið er savn hansara av –miðanøvnum úr øllum landinum. Staðanøvn hevur hann eisini savnað. Hann var fyrstur at fáa nøvn á bjørgum fest á stórar litmyndir. Hann var ein høvuðsmaðurin at leggja støði undir próvnámini á Føroyamálsdeildini. Har kom kunnleiki hansara við arbeiði á lærdum háskúla til góðar.

Hann hevur skrivað hesar greinir í Fróðskaparrit:

1959. *Um navnaliðin -inga í nøkrum staðanøvnum í Suðuroynni*. 8. bók: 57-65.
1973. *Svale Solheim (minnisorð)*. 21. bók: 183-186.
1976. *Ein "rimnaflokkur" í føroyskari tungulist?*. 24. bók: 46-70.
1977. *Navnagávan á føroyskum miðum*. 25. bók: 105-120.
1981. *Mangt er sagt um Magnus konga*. 28.-29. bók: 30-45.
1989 (1986-87). *Eg havi verið við havsins botn og stundum uppi við ský*. 34.-35. bók: 5-22.

Hann var kosin felagi í Kungliga Gustav Adolfs Akademien í Uppsølum í Svøríki í (1978), og Finska Litteratursällskapet í 1980. Í 1986 fekk hann norska St. Olavs heiðursmerkið.

**Jóannes Rasmussen**,
29. februar 1912 – 5. januar 1992.
Minningarorð hevur Jóhannes Jóhansen skrivað í bók 40. Jóannes Rasmussen hevur skrivað hesar greinir í Fróðskaparrit:

1952. *Um kolarannsóknir í Hvalba*. 1. bók: 131-147.
1953, saman við Sverri Dahl. *Nólsoyarfundurin*. 2. bók: 45-59.
1955. *Nøkur orð um gjáir í Føroyum – uppruna teirra og aldur*. 4. bók: 108-124.
1956, saman við Sverri Dahl. *Víkingaaldargrøv í Tjørnuvík*. 5. bók: 153-167.
1957. *Yvirlit yvir innskotin grótsløg í Føroyum*. 6. bók: 61-96.
1958. *Kolanøgdin í Suðuroy*. 7. bók: 102-114.
1962. *Um goshálsar í Føroyum og um eitt møguligt samband millum goskluftir, goshálsar og firðir*. 11. bók: 81-96.
1963, saman við B. Eske Koch. *Fossil Metasequoia from Mikines, Faroe Islands*. 12. bók: 83-96,
1970. *Døll – Koltursdøll*. 18. bók: 178-182.
1972. *Mórena á Borðoyarvík, sum bendir á eitt millumbil í glersetingini har noðuri*. 20. bók: 54-70.
1972. *Hugskot um áir sum renna undir heilum*. 20. bók: 89-98.
1973. *Fyribils frásøgn um botnkanningar á sjóøkinum uttan um Føroyar*. 21. bók: 86-93.
1974. *Botnkort sum ískoyti til greinina "Fyribils frásøgn um botnkanningar sjóøkinum uttan um Føroyar"*. 22. bók: 142-143.
1975, saman við R. Waagstein. *Glacial Erratics from the Floot South-East of the Faroe Islands and the Limit of Glaciation*. 23. bók: 101-119.
1977, saman við G. Jørgensen. *Glacial striae, roches moutonnées and ice movements on Suðuroy (Faroe Islands)*. 25. bók: 174-193.
1978, saman við G. Jørgensen. *Glacial striae, roches moutonnées and ice movements on Sandoy (Faroe Islands)*. 26. bók: 9-21.
1979, saman við P. Hedebol Nielsen, R. Waagstein og Birger Larsen. *Marine Seismic Investigation of the Shelf around the Faroe Islands*. 27. bók: 102-112.
1981, saman við G. Jørgensen. *Glacial striae, roches moutonnées and ice movements in the southern part of Streymoy and Eysturoy (Faroe Islands)*. 28.-29. bók: 52-63.
1982, saman við A. Noe-Nyggard. *Um dýpdarboringar í Vestmanna og í Lopra*. 30. bók: 9-22.

**Hjalgrim Winther**,
20. mai 1914 – 8. oktober 1984.
Hjalgrim varð borin í heim í Klaksvík. Sum smádrongur fór hann til Havnar at ganga í skúla og tók realprógv har, fór síðani í maskinlæru og tók prógv sum maskinmeistari seinni. Hann sigldi sum maskinmeistari við donskum farmaskipum, til hann av krígsávum legðist upp á land og fór at ganga á Polyteknisk Læreanstalt, haðani hann tók prógv sum verkfrøðingur.

Fyrst í fimtiárunum var SEV farið undir útbygging av vatnorkuni, og hevði Hjalgrim tá starv í ráðgevandi verkfrøðingafelagnum P.A. Petersen, ið hevði umsjón við útbyggingini, og kom hann á henda hátt til Føroyar aftur.

Tá háspenningslinjan skuldi spennast av Streymoynni yvir á Vágalandi, kom Hjalgrim til skaða, varð sundurbrotin og fekk langa og stranga sjúkralegu.

Í 1953 var útbyggingin hjá SEV komin so langt ávegis, at søkt varð eftir stjóra. Hjalgrim lá tá á Landssjúkrahúsinum, og komu tá umboð fyri SEV-stýrið út til hansara at royna at fáa hann at søkja starvið.

Hann tók av og varð settur í starv 12. september 1953.

Í Fróðskaparriti hevði hann greinina:

1958. *Máting av avfalli og frárenning fyri avfallsøkið hjá Fossáverkinum*. 7. bók: 22-45.